## Bilurin fór í havið

Her er ein aprílsøga, sum er sonn.

Fríggjadagin 1. apríl fór røktingarmaðurin Leon Sólheyg í Klaksvík ein túr í hagan.

Bilin seti hann á endanum á Oyrarvegnum, á Núpi, og fór til gongu.

Tá ið hann kom aftur, var eingin bilur.

Bilurin var farin í havið.

– Tað var fínasta veður. Maðurin mundi hava gjørt eitt mistak, sigur Leon Sólheyg.

Bilurin smildraðist sundur og verður ikki til bil aftur.

Hann var skrokktryggjaður.




*Í mortin letur skoytibreytin aftur...*

# So verður ikki skoytað meira

**SKOYTIBREYTIN** 27.000 fólk hava nýtt Skoytibreytina

Leo Poulsen

Leygardagin verður seinasti møguleiki hjá fólki at hugna sær á skoytubreytini fyri hesu ferð, tá býráðið endar sesongina við tónleiki, kaffi og pylsum.

Skoytibreytin á Skálatrø má sigast at vera ein sólskinssøga burturav.

Sagt verður, at umleið 27.000 fólk hava hugnað sær á breytini hesar mánaðirnar, hon hevur staðið uppi á Skálatrø.

Eftir áheitan frá einum av yngru borgarunum í býnum hevur skoytibreytin verið opin tvær vikur longri enn upprunaliga ætlað, men leygardagin verður so seinasti dagur á hesum sinni, at fólk sleppa at renna á skoytum á Skálatrø.

- Vit ætla at markera afturlatingina við tónleiki, kaffi og pylsum leygardagin seinnapart. Og so haldi eg, at royndirnar hava víst, at við føroyska veðrinum er tað eitt gott hugskot at hava breytina innilokaða, tá hon letur upp aftur komandi heyst, sigur Heðin Mortensen.

Tað er sjálvandi illfýsið í regni og vindi at renna á skoytum undir opnum Himni, og tí verður arbeitt við møguleikanum at inniloka skoytubreytina, helst undir einum tjaldi, tá latið verður upp aftur komandi heyst.

Vodafone hevur leigað vøllin frá klokkan 9 á morgni til klokkan 15 seinnapartin í sambandi við 10 ára føðingardagin hjá telefyritøkuni, og tá verður ókeypis at skoyta. Eftir klokkan 15 tekur kommunan yvir, og tað verður framhaldandi ókeypis at skoyta so leingi fólk orka.

## 191 mió til parta-eigarar

Bakkafrost hevur havt aðalfund, og ársroknskapurin fyri 2010 varð góðkendur.

Úrslitið er áljóðandi 259 milliónir krónur eftir skatt, og hevur samtakið eina eginogn á 902 milliónir krónur við árslok 2010.

Aðalfundurin samtykti at gjalda út vinningsbýti upp á 3,91 krónur fyri hvørt partabrævið, svarandi til DKK 191 milliónir í alt.

Aðalfundurin samtykti eisini, at teir nevndarlimirnir, sum stóðu fyri vali vóru afturvaldir í eitt 2 ára skeið. Teir vóru Rúni M. Hansen, Annika Frederiksberg og Odd Eliasen. Rúni M. Hansen varð valdur at halda fram sum nevndarformaður. Hinir nevndarlimirnir eru Johannes Jensen, Virgar Dahl og Trine Sæther Romuld.

Í valnevndina stóðu Hans Jacobsen, Tummas Eliasen og Bergur Poulsen fyri vali og vóru teir afturvaldir í eitt 2 ára skeið.

Harafturat varð samtykt, at nevndin í Bakkafrost fekk heimild til, vegna felagið, at keypa upp til 10% í egnum partabrøvum og at hækka partapening felagsins við upp til 4.800.000 partabrøvum nominelt.

## Eldur í bili



Klokkan sjey í morgun kom knappliga eldur í ein bil, sum stóð parkeraður á Heygsbreyt í Havn.

Bilurin, sum var av merkinum Citroen, hevði ikki verið í gongd frammanundan.

Sløkkiliðið sløkti eldin, og Akstovan fer at kanna bilin fyri at fáa at vita, hví eldur knappliga kom í.




*Sigurð Simonsen í Fuglafirði er ein av borgarstjórunum, sum vil hava løgtingið at gloya alt um samanlegging*

# Ímóti kommunu-samanlegging

**SAMANLEGGIN** Seks borgarstjórar mæla frá samananlegging

Randi Jacobsen

Seks borgarstjórar biðja í opnum brævið landsstýrið og løgtingið gloym alt um at noyða kommunur um at leggja saman.

Teir seks borgarstjórarnir eru Sigurð S. Simonsen í Fuglafirði, Suni Jacobsen í Sørvági, Otto West í Hvalba, Rólant Poulsen á Eiði, Kirsten Strøm Bech í Vági og Dánjal Petur Müller í Kvívík.

Tey siga seg einki hava ímóti at fáa fleiri borgaratænastur at umsita, og um so skuldi verið, og peningur fylgir við, ivast tey ikki í, at tey megna uppgávuna.

Teimum dámar betur sjálvbodna enn tvungna samanlegging.

- Við ógvusligum samanleggingum verður tann fólksliga umboðanin nógv skerd, somuleiðis sum vandi eisini er fyri, at drívmegin og framsóknin í kommunum og kommununnar millum minkar mundandi, stendur í brævinum.

16.-19. MAI:

VIÐ ÓLA TIL ÍSLANDS FYRI 2.345

ÍROKNAÐ: 1 KOYGGJA Í DEILDUM 4-KOYGGJUKAMARI + 2 x BUFFET + 3 x MORGUNMAT + 1 x MATPAKKA + BUSSÚTFERÐIR Í ÍSLANDI

VITJIÐ SLÓÐIR FØROYINGA Í ÍSLANDI

Komið við til Seyðisfjarðar 16. mai og upplivið Ísland saman við Óla Jacobsen, blaðmanni, sum fer at greiða frá ymiskum søguligum hendingum, sum føroyingar hava verið partur av. Vitjað verður á Norðfjørðinum, Vattarnesi og Seyðisfirði.



Óli Jacobsen verður við á túrinum sum frásøgumaður

SMYRIL LINE EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

TLF. 34 59 00
WWW.SMYRILLINE.FO